

### Mugu sjálvi gera meiri

John Eli Olsen sigur, at skulu vit gera okkum vónir at at fáa føroyskar fyritøkur upp í oljuvinnuna, er einasti møguleikin, at vit leggja líka nógva orku í at sleppa føroyskum fyritøkum upp í part í oljuvinnuni uttanlands, sum vit leggja í at sleppa føroyskum fyritøkum upp í oljuvinnuna í Føroyum.

Hann sigur at ein stórur vansi hjá føroyskum fyritøkum, er, at tað er torført og dýrt at ferðast loftvegis.

– Allir flutningur er umvegis Keypmannahavn og tað ger tað dýrt at ferðast aftur og fram og tað er ein avgjørdur vansi fyri okkara kappingarførið og ger tað samstundis torført at leggja til rættis.

Tí saknar hann stórliga beinleiðis flogsamband ímillum Noreg og Skotland.

Hann ásannar kortini, at hetta er batnað í seinastuni, men tað sum veruliga krevst, er at tað er beinleiðis flogsamband alt árið við onnur lond enn Danmark, eitt nú Skotland og Noreg.

– Skulu vit fáa nakað virksemi á føtur uttanlands. Kann beinleiðis flogsamband nakrar mánaðir um árið, ikki brúkast til nakað sum helst. Tað skal vera alt árið, staðfestir hann.

Hann vísir á, at Atlantsflog hevur eina avtalu um flúgving í Noregi, men enn er so onki fast flogsamband ímillum Føroyar og Noreg komið burturúr og tí heldur hann, at sum heild hevur føroyskt fingið ov lítið gagn burturúr tí.

Hann fýlist á, at tær føroysku fyritøkur, sum annars eru í oljuvinnuni, gera alt ov lítið burturúr at fáa føroyskar fyritøkur við í oljuvinnuna uttanlands.

– Vit hava tvey føroysk oljufeløg, Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni, men hvørgin teirra ger nakað fyri at fáa føroyskar fyritøkur upp í oljuvinnuna.

– Hetta skulu eitast at vera føroysk oljufeløg, men mær vitandi gera tey onki fyri at hjálpa føroyskum vinnulívið upp í oljuvinnuna og tað er harmiligt.

– Og tá ið vit sjálvi gera so lítið, er torført at krevja, at útlendsk oljufeløg skulu gera nakað fyri føroyskt vinnulív, heldur stjórin í El-Service.

Hann leggur afturat, so leingi hetta er støðan hjá føroysku oljufeløgunum, dugir hann ikki at síggja beinleiðis endamálið hjá føroyingum at fara upp í oljuvinnuna yvirhøvur.

– Tá ið føroysku oljufeløgini vórðu stovnað, setti eg mítt álit á, at tey fóru at virka fyri, at fáa føroyskt vinnulív upp í oljuvinnuna, men tað er so ikki hent – enn, í hvussu so er.

– Eg haldi, at tær føroysku fyritøkur, sum longu eru slopnar upp í útlendsku oljuvinnjuna, áttu at gjørt meiri fyri at fáa føroyskt vinnulív upp í, leggur hann afturat.

– Vit mangla tann hugburðin, at vit skulu brúka føroyskt. Vit skuldu havt meiri av tí íslendska og norska hugburðinum í okkum, leggur hann afturat.

### Vit eru als ikki til reiðar

Higartil hava vit bert leitað eftir olju við Føroyar. Men kann væntast, at støðan fer at broytast, finna vit olju?

– Tað er ein spurningur. Eg haldi í hvussu so er, at verður olja funnin í summar, eru allarflestu føroysku fyritøkur ov seinar á sjóvarfallinum við atliti til at fyrireika seg til eina oljuvinnu.

– Verður olja funnin í summar, verða vit sostatt rend um koll av útlendskum fyritøkum og so verður tað rættiliga torført hjá føroyskum fyritøkum at fóta sær, eisini í longdini.

John Eli Olsen sigur, at føroyskar fyritøkur hava lagt stóra orku í at fáa ISO 9000 góðkenning, sum skuldi vera lykilin til tað lovaða landið.

Men nú manglar ein annar lykil og tað er at fáa heilsu-trygdar- og umhvørvisgóðkenning.

– Tað er ein rættiliga stór og umfatandi avbjóðing og er nógv meiri umfatandi enn at fáa ISO 9000 góðkenning.

– Spurningurin er tí um vit ístaðin fyri at leggja so stóran dent á ISO 9000, heldur áttu at lagt dentin á at fingið heilsu-trygdar- og umhvørvisgóðkenning, heldur hann.

Annars heldur hann, at tað ein stór forðing hjá føroyskum fyritøkum, at tær eru ov lítlar. Fyri at fáa sáttmála við eitt oljufelag, skulu tær føroysku fyritøkurnar verða væl størri, enn tær eru í dag.

– Sostatt er tað ongin, føroyskur tænastuveitari, sum fær møguleikan at gera beinleiðis sáttmála við eitt oljufelag, staðfestir stjórin í El-Service

– Vit kunnu í besta føri vænta at verða undirveitari hjá einum størri veitara, leggur hann afturat.

Men fyri tað gongur stjórin í El Service ikki og vónar, at vit ikki finna olju.

– Vit eru so væl fyrireikað sum tilber. Men tað ber ikki til at brúka pening upp á at fyrireika seg, uttan at hava trygd fyri arbeiði. Ongin kann blíva við at brúka pening upp á at fyrireika seg upp á tað óvissa.

Tí væntar ohn Eli Olsen, at sum støðan er nú, verða tað fáar, føroyskar fyritøkur, sum sleppa upp í oljuvinnuna, yvirhøvur.